ítróttur

Nr. 20 • hósdagur • 30. januar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Fram-ÍF 3-1

# So tapti ÍF

**Fram er aftur við í stríðnum um gullmerkini**

FLOGBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Oddaliðið í meistaradeildini hjá monnum ÍF, mátti sunnudagin leggja rygg til fyrsta ósigur í ár í landskappingini. Fuglfirðingar vóru á vitjan í Hoyvíkshøllini, har mótstøðuliðið var Fram. Dysturin endaði við einum 3-1 sigri til heimaliðið, sun harvið steðgaði sigursgongdini hjá ÍF.

Hjá Fram má sigurin kennast kærkomin, tí felagið hevur staðið fyri skotum seinastu tíðina. Eftir at hava fingið úrskurðin, at teir nýttu ólógligan leikara í dystinum ímóti Mjølnir, var neyðugt hjá havnarliðnum at vinna dystin sunnudagin, um teir framvegis skuldu vera við í kappingini um gullmerkini.

Fyri fuglfirðingar var talan um fyrsta ósigur í ár, men framvegis liggja teir leysir av hinum liðunum, Komandi vikuskiftið skulu teir til klaksvíkar at leika ímóti Mjølnir, og tapa teir dystin, so kemur rættiligur spenningur í aftur meistaradeildina hjá monnum.



*Lagt er upp til eitt brak bæði í meistaradeildini hjá kvinnum og monnum, tá Mjølnir fær vitjan av ÍF hetta vikuskiftið*

*Mynd: Savnsmynd*

Dráttur-TB 0-3

# Føroyameistararnir vunnu á Giljanesi

FLOGBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

TB vann greiðan 3-0 sigur á Drátti leygardagin. Eftir ósigurin seinasta vikuskiftið ímóti Mjølnir, var tað av stórum týdningi at TB vann dystin, um vónirnar um gullmerkini skulu varðveitast. Tað var ongin ivi um úrslitið sunnudagin, og TB vann fult uppiborið.

Við sigrinum sunnudagin liggja føroyameistararnir fýra stig eftir oddaliðið Mjølnir, so møguleikin hjá tvørakvinnum at endurvinna meistaraheitið er framvegis til staðar.

Fleyr-Mjølnir 1-3

# Fleyr framvegis onki stig

FLOGBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Í meistaradeildini hjá monnum gongur av skriðuni hjá havnarfelagnum, Fleyr. Síðsta vikuskifti fingu teir vitjan av Mjølnir, og heldur ikki hesa ferð eydnaðist tað Fleyr at vinna dystin. Dysturin endaði við einum 3-1 sigri til Mjølnir.

### Byrjaðu væl

Botnliðið úr Havn legði væl út, og vann fyrsta settið 25-19. Klaksvíkingar svaraðu aftur og vunnu næsta settið 25-12, og tá fór luftin úr heimaliðnum. Mjølnir vann eisini tvey tey næstu settini, og hevur við sigrinum sunnudagin stytt um frástøðuna til oddaliðið ÍF. Komandi vikuskiftið bresta júst Mjølnir og Fleyr saman í Klaksvík, og við einum sigri kunnu klaksvíkingar vinna seg enn meir inn á ÍF.

Fleyr-Mjølnir 1-3

# Mjølnir vann eisini kvinnudystin

FLOGBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Eins og hjá monnum vann Mjølnir eisini kvinnudystin ímóti Fleyr sunnudagin. Her var sama søgan sum hjá monnunum, Fleyr vann fyrsta settið, men so kom Mjølnir fyri seg, og vann trý tey næstu settini. Hóast klaksvíkskvinnur vóru nakað skerdar til dystin, so var ongin ivi um úrslitið, og vunnu tær ein greiðan 3-1 sigur.

Við sigrinum hevur liggur Mjølnir í hølinum á ÍF. Komandi vikuskiftið fær Mjølnir vitjan av ÍF, og úrslitið av tí dystinum kann væl koma at hava stóran týdning fyri hvar gullkrónurnar í meistaradeildini hjá kvinnum fara í ár.

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 14 | 12 | - | 2 | 40 | 15 | 25 | 16 |
| 2 Mjølnir | 14 | 11 | - | 3 | 37 | 14 | 23 | 15 |
| 3 TB | 14 | 10 | - | 4 | 35 | 15 | 20 | 12 |
| 4 Dráttur | 14 | 5 | - | 9 | 20 | 35 | -15 | 5 |
| 5 Fleyr | 14 | 3 | - | 11 | 13 | 35 | -22 | 5 |
| 6 KÍF | 14 | 1 | - | 13 | 8 | 39 | -31 | 1 |

**Meistaradeild, menn**

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 11 | 10 | - | 1 | 31 | 5 | 26 | 12 |
| 2 Mjølnir | 11 | 7 | - | 4 | 23 | 16 | 7 | 9 |
| 3 Fram | 11 | 6 | - | 5 | 22 | 17 | 5 | 8 |
| 4 SÍ | 11 | 5 | - | 6 | 17 | 20 | -3 | 7 |
| 5 Fleyr | 12 | 0 | - | 12 | 1 | 36 | -35 | 0 |



# HB-málverjar úttiknir

**Tað er eisini greitt, at norska felagið Bryne verður annað av mótstøðuliðunum hjá føroyska landsliðnum á venjingarleguni í Spania**

VENJINGARLEGA
*Páll Holm Johannesen*

HB-málverjarnir Poul N. Joensen og Bárður Johannesen eru báðir úttiknir til venjingarnar hjá landsliðnum í vikuskiftinum. Jógvan Martin Olsen, hjálparvenjari, sigur, at úttøkan av teimum báðum er gjørd við tí fyri eyga at hyggja nærri at, hvussu teir standa seg í mun til hinar málverjarnar á landsliðnum.

### Útisetar ikki við

Hvørki Christian Høgni Jacobsen ella Jákup Mikkelsen verða við í Spania. Báðir eru bundnir av feløgum teirra, ið eisini fara venjingarlegu um sama mundið. Christian Høgni fer við Vejle til Kina, meðan Jákup Mikkelsen skal á venjingarlegu við Molde



*HB-málverjin, Bárður Johannesen , skal saman við Poul N. Joensen luttaka í venjingunum hjá landsliðinum um vikuskiftið.*

*Mynd: Savnsmynd*

Tað er óvist við Jón Róa Jacobsen, tí tað tykist sannlíkt, at hann fer at gera sáttmála við Brøndby. Danska meistaraliðið fer á venjingarlegu í Turkalandi, og helst verður Jon Rói við á ferðini. Hann verður tí ikki tøkur hjá landsliðsvenjaranum í Spania

Bruttohópurin telur í løtuni 27 mans, og av teimum skulu sjey sáldast frá til venjingarleguna í Spania. Hvørjir teir tjúgu verða, fast endaliga at vita eftir úttøkuvenjingina um vikuskiftið.

Jákup á Borg er einasti leikari, sum dregur við skaða í løtuni, og enn er óvist um hann fer við til Spania. Jákup hevur trupulleikar við lúskuni, og í løtuni røkist onki fyri at støðan gert betri, og tí má landsliðið helst verða hann fyriuttan í Spania.

### Ingi verður við

Føroyski Arsenal-leikarin, Ingi Højsted, verður við vissu ein av leikarunum, sum verður við í Spania. Jógvan Martin Olsen sigur, at ætlanin er at hava tveir ungar leikarar við, og Ingi Højsted verður annar.

Hóast Ingi er bundin av uppgávum í Arsenal, so hevur enska meistaraliðið játta Inga at fara við føroyska landsliðnum til Spania. Hvør hin leikarin verður, er ikki greitt enn.

### Møta norska Bryne

Annað av mótstøðuliðnum hjá landsliðnum í Spania verður norska felagið Bryne. Hetta váttar Jógvan Martin Olsen, og leggur afturat, at enn er óvist, hvat hitt mótstøðuliðið verður. Helst verður talan um okkurt spanskt felag, men enn ongin avtala komin í lag.

# Tvey 1.deildarfeløg ætla sær Súna Fríða

**Sjálvur hevði framherjin hugsað sær eitt felag, ið ikki liggur ov langt frá heimbygdini Kvívík**

FÓTBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*

Tvey 1.deildarfeløg hava sýnt Súna Fríða Johannesen áhuga, eftir at hann varð loystur úr sáttmála sínum við GÍ. – Eg havi fingið tveir fyrispurningar frá tveimum feløgum í 1. deild, men enn er onki ítøkiligt komið burturúr, sigur Súni Fríði í viðmerking til Sosialin.

Súni Fríði leggur dent á, at hann ætlar sær at finna eitt felag, ið ikki liggur ov langt frá heimbygdini Kvívík. – Tíðin til fótbólt er ikki so góð sum áður, og tí hevði verið best, um eg slapp frá at ferðast ov nógv til venjing. Eg skal eisini byggja hús í vár, og tí havi eg ikki tíð at venja meir enn 3-4 ferðir um vikuna, og tað verða fortreytirnar hjá tí felagnum, eg fari at leika við í ár, greiðir Súni Fríði frá.



*Framherjin Súni Fríði Johannesen ætlar sær at finna eitt felag, ið ikki liggur ov langt frá heiminum í Kvívík.*

*Mynd: Savnsmynd*

Súni Fríði breyt beinið í november mánað, og venur í løtuni sjálvur. Uppvenjingin gongur væl, og sjálvur væntar hann heilt skjótt at kunna venja við bólti.

# FCK brynjar seg út til várhálvuna

**Todi Jónsson er smáskaddur, og er tí ivasamur til venjingardystin leygardagin ímóti Malmø**

ÚTISETAFELAG
*Páll Holm Johannesen*

Oddaliðið í Superliguni, FCK, hevur fyrireikað seg nú í góðan mánað til várhálvuna. Leygardagin skal høvuðsstaðarliðið spæla venjingardyst ímóti Malmø.

FCK má verða Martin Albrechtsen og Thomas Røll fyriuttan, tí báðir eru á veningarlegu við ligalandsliðnum. Føroyski framherjin, Todi Jónsson, er ivasamur til venjingardystin ímóti Malmø, tí hann hevur trupulleikar við øklinum. Annars eru allir mans tøkir, fyriuttan Christan Lønstrup og sviin Thomas Antonelius, sum báðar dragast við skaða.

Annars lata teir sera væl at nýggja ungverska málverjanum í FCK, Balacz Raboczki, sum hevur staðið seg væl fyrstu vikuna í FCK. Væntandi fær ungverjin møguleikan saman við Ole Tobiassen ímóti Malmø leygardagin.

# Mótstøðuliðið hjá VB finnast í kvøld

COCA COLA CUP KAPPINGIN
*Páll Holm Johannsen*

Seinasta vikuskiftið gjørdist greitt, at annað av liðunum í steypafinaluni hjá kvinnum í ár verður VB. Hvørjum liðið tær møta í finaluni fæst at vita í kvøld, tá VÍF og Stjørnan spæla seinnu hálvfinaluna í Vestmanna. Fyrra hálvfinala endaði við einum teprum 18-17 sigri til Stjørnuna, so lagt er upp til spennandi dyst í Vestmanna í kvøld.

Dysturin millum VÍF og Stjørnuna byrjar klokkan 19.00, og Eyðun Samuelsen og Hannis Wardum úr Kyndli døma dystin.